Sóljan–Kyndil 22–19 (12–9)

# Endiliga vann Sóljan

**Eftir at grundspælið bert hevur givið Sóljuni ósigrar, eydnaðist loksins vágagentunum at bjarga sær tvey stig, tá Kyndil vitjaði**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað hevur verið tungur burður hjá Sóljuni, nú liðið hetta kappingarárið hevur roynt seg í bestu kvinnudeildini. Alla tíðina hevur setningurin verið at bjarga plássinum í deildini, og størsta partin av tíðini hevur verið líkt til, at hetta stríðið fór at vera til fánýtis hjá teimum.

Eftir at tær í grundspælinum vunnu heimadystin móti Tjaldri, hevur talan bert verið um ein einstakan javnleik í Runavík, men meðan runavíkingar síðani hava fingið styrk, hava tær í Vágunum mist toppskjúttan. Síðani tá hevur tað alla tíðini líkst einari niðurflyting, og ikki minst varð hetta staðfest, tá tær vitjaðu hjá Tjaldrinum.



*Sólja Nielsen fegin um sigurin á Kyndli, og nú tykist møguleikin kortini at vera til staðar hjá vágagentunum*

### Høvdu tak á

Møguliga er tó ikki øll vón sløkt hjá Sóljuni. Sunnudagin høvdu tær vitjan av Kyndli, og hóast tað var eitt sera óvæntað úrslit, so var tað kortini ikki óuppiborið, skilst.

Sóljan var alla tíðina tað av liðunum, sum hevði munin á máltalvuni, tó at talan ikki var um nakran stóran mun. Fyrra hálva tíman vóru eitt og tvey mál mesti munurin, fram til Sóljan seinastu løtuna skeyt trý mál á rað.

Hetta skuldi eisini vísa seg at verða ein sera avgerandi løta, tí eftir hetta megnaði Kyndil ongan tíð at stríða seg heilt upp ímóti heimaliðnum. Heldur ikki tá hesar tvær reisur við stuttum millumbildi vórðu raktar av tveimum útvísingum.

### Stríddust

Ein av leikarunum á liðnum hjá Sóljuni er Sólja Nielsen, og einki er at taka seg aftur í, at hon var fegin um tey bæði stigini, sum vágagenturnar høvdu bjargað sær.

– Orsøkin til sigurin var fyrst og fremst tann, at vit tóktust meira uppsettar til hendan dystin, enn vit hava verið fleiri av undanfarnu dystunum. Vit stríddust meira enn vit plaga,. og tá vit so eisini høvdu leiðsluna nær um alla tíðina, so skumpaði hetta sjálvandi eyka undir okkum.

– Vit fingu tó nakað av trupulleikum, tá tær móti endanum skiftu til eina 5-1 verju, men tíbetur eydnaðist tað okkum kortini at halda fast, sigur hon um dystin.

### Móti Tjaldri

Spurd, hvussu tað ber til, at úrsltiini kunnu vera somikið óstøðug, sum tey hava verið hjá Sóljuni í seinastuni, vísir hon aftur á, at tær mugu stríðast í hvørjum dysti.

– Tá vit vóru í Klaksvík, vistu vit undan dystinum, at vit ongan møguleika høvdu, og úrslitið varð eisini hareftir, var svarið vit fingu til hetta.

At úrslitið móti Kyndli hevur givið Sólju og Sóljuni betri mót til komandi dystirnar, sum helst skulu tryggja liðnum móti niðurflyting, er einki at ivast í. Sólja ivast tó ikki í, at tað verður í seinasta dystinum móti Tjaldrinum, at hetta skal gerast.

– Eg rokni ikki við, at vit koma at hava nakran serligan møguleika móti VB og Neistanum, so hesir dystir verða helst nýttir sum eitt slag av venjing, har vit fyririeika okkum til dystin móti Tjaldrinum, sigur hon at enda.

Tað er eisini líkt til, at talan fer at verða um ein altavgerandi dyst, tá Sóljan á seinasta leikdegi fer at takast við Tjaldur. Í løtuni hava bæði liðini fýra stig, men Tjaldur má tó sigast at hava møguleika at rykkja nakað frá, tá tær á heimavølli skulu royna seg móti Kyndli. Undir øllum umstøðum verður tað millum Tjaldur og Sóljuna, at stríðið um niðurflyting skal standa, og so má tíðin vísa, hvørt av liðunum skal skifta um við StÍF, sum frá komandi kappingarári aftur verður at síggja í bestu deildini.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Sóljan: Hertha Simonsen 7, Louisa Jørgensen 4, Sólja Nielsen 4, Marjun Jørgensen 2, Jóhann i Horni 2, Heidi Haraldsen 2, Heidi Maria Akdselsen 1
Kyndil: Jórun Ludvic 7(2), Lotte Sørensen 5(3), Jensia Petersen 3, Ingrid Petersen 1, Kristbjørg Petersen 1, Erla Smith 1, Óluvá Dalsgaard 1
Brotskøst: Kyndil 6
Útvísingar: Sóljan 2
Dómarar úr VÍF: Ingi Olsen og Símun Olsen

## Máltindurin:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ioana Rapa | VÍF | 167 | (40) |
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 145 | (34) |
| Regina Radó | VB | 131 | (34) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 123 | (41) |
| Annika Thomsen | Neistin | 122 | (21) |
| Andrea Lütz | VB | 111 | (9) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 105 | (50) |
| Jórun Ludvig | Kyndil | 99 | (16) |
| Vesna Tomajek | Stjørnan | 96 | (27) |
| Nicolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 94 | |
| Fríða Marjunardóttir | VÍF | 94 | (9) |
| Gurið Mortensen | VB | 92 | (5) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 91 | (1) |
| Beinta Joensen | Tjaldur | 77 | (12) |
| Annika Ljósstein | Stjørnan | 70 | (7) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Halgir D. Olesen | H71 | 189 | (37) |
| Bjarni Wardum | Kyndil | 159 | (48) |
| Dorica Tomic | KÍF | 127 | (34) |
| Ingi Olsen | VÍF | 123 | (32) |
| Artur Johansen | StÍF | 123 | (44) |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 121 | (16) |
| Sámal Joensen | VÍF | 108 | (9) |
| Áki Olsen | VÍF | 103 | (8) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 102 | (27) |
| Jónleif Sólsker | Kyndil | 99 | (23) |
| Martin Hummeland | VÍF | 95 | |
| Mortan Hansen | Tjaldur | 80 | (3) |
| Alexandur Johansen | StÍF | 78 | (2) |
| Kári Mortensen | Neistin | 78 | (16) |
| Zoran Sarcevic | Tjaldur | 78 | (38) |

### Støðan 1. Deild kvinnur

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 9 | 9 - 0 - 0 | 632 | 339 | 293 | 30 |
| 2 Stjørnan | 8 | 6 - 0 - 2 | 544 | 420 | 124 | 22 |
| 3 VB | 9 | 5 - 0 - 4 | 548 | 438 | 110 | 19 |
| 4 Neistin | 7 | 5 - 0 - 2 | 414 | 404 | 10 | 15 |
| 5 Kyndil | 8 | 1 - 1 - 6 | 461 | 558 | -97 | 8 |
| 6 Tjaldur | 8 | 1 - 1 - 6 | 307 | 512 | -205 | 4 |
| 7 Sóljan | 9 | 1 - 0 - 8 | 340 | 575 | -235 | 4 |

### Støðan 1. Deild menn

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 8 | 7 - 0 - 1 | 644 | 482 | 162 | 26 |
| 2 StÍF | 9 | 6 - 1 - 2 | 614 | 542 | 72 | 21 |
| 3 Kyndil | 8 | 4 - 2 - 2 | 563 | 512 | 51 | 18 |
| 4 Neistin | 8 | 5 - 0 - 3 | 491 | 499 | -8 | 16 |
| 5 KÍF | 8 | 3 - 2 - 3 | 486 | 534 | -48 | 11 |
| 6 H71 | 9 | 1 - 0 - 8 | 533 | 617 | -84 | 6 |
| 7 Tjaldur | 8 | 0 - 1 - 7 | 458 | 603 | -145 | 4 |



# Væleydnað gospelkonsert

KONSERT
*Elinborg Joensen*



*Tey syngja Harranum prís*

Leygarkvøldið skipaði HeimaMissiónsUngdómur (HMU), fyri einari gospelkonsert í Runavík. Hetta er fyrstu ferð at HMU skipar fyri slíkum tiltaki. Og sigast má, at tað var væleydnað. Eini 1000 fólk høvdu leitað sær inn í Ítróttarhøllina at lurta eftir VOX, MMM og I Am

Fyrst á pallin var ungdómskórið VOX, ið fyri tað mesta er mannað við ungdómi úr Eysturoynni. Men eisini eru nakrir sangfuglar aðrastaðni frá. Og sangfuglar er rætta orðið um kórið. Rútmisku gospeltónarnir saman við hesum frálíku røddum, bergtóku áhoyrarafjøldina. Tónleikararnir, saman við kórleiðaranum Ásbjørn Berthelsen, hava eisini rós uppiborið. Lógvabrestirnir hoyrdust, bæði meðan kórið sang, og ikki minst aftaná. So væleydnað var framførslan, at tey vórðu rópt uppaftur á pallin. Kórið hevði bert enskar sangir á skránni, men tað hevði tó ongan týdning, tí áhoyrarafjøldin fyri tað mesta var ungdómur.

Næst vóru MMM úr Vágunum, sum eisini hava luttikið í Prix Føroyum. Tey framførdu alt frá gospel/rock tónleiki til ein peppaðan ”Tú alfagra land mítt”! Summi løg ið tey spældu, vóru kend løg, ið aðrir bólkar hava givið út, t.d. ”Testify” hjá Avalon, This little light of mine, og aðrir. Men eisini vóru nýggir sangir, ið fyrstu ferð vóru framførdir á Prix Føroyum. Heldur ikki her sluppu áhoyrararnair at standa hendur í lumma. Um teir ikki hoppaðu áður, so máttu teir nú røra seg kortini. MMM gjørdi ikki mætari enn at tríva í ”Høvur, akslar, knø og tær”, meðan áhoyrararnir gjørdu tekn til. Tey duga framúr væl at improvisera. Tað var t.d. neyvan ætlanin at syngja tjóðsangin. Her komu teirra tónleikaligu evni rættiliga til sjóndar. Tey eru óføra góð, til at fáa áhoyrararnar at liva seg inn í tónleikin. Ein sera væleydnað framførsla.

Ein steðgur var, har ein kundi ogna sær fløgur og bøkur. Eisini vóru vaflur og ein kaffimunnur til keyps. Og allatíðina kundi ein keypa sær sodavatn, og annað at leska seg við

Áðrenn I Am fór á pallin, hevði Finn Johannesen úr Klaksvík eina andakt. Hann legði út við at vísa eitt kynstur, har hann fekk fyrst ein, og síðani tveir og tríggjar gullfiskar - úr pappíri væl at merkja - at hoppa ímillum trý bond. Hann snýtti okkum øll. Vit skiltu ikki, hvussu hann fekk fiskarnar at hoppa ímillum bondini.

Somuleiðis er tað ein annar ið roynir at snýta okkum. Hann eitur Illimaður. Hann roynir alt hvat hann kann at fáa okkum burtur frá okkara kristnu trúgv. Síðani vísti hann okkum eitt brot úr einum sangi hjá DC-talk, við videokanón. Brotið ljóðar soleiðis: ”What if I stumble, and what if I fall? What if I lose my step, and I make fools of us all? Will the love continue, when my walk becomes a crawl? What if I stumble, and what if I fall? Á føroyskum ljóðar hann nakað soleiðis: ”Hvat um eg snávi og falli, hvat um eg missi fótafestið, og geri øll til neyðardýr? Heldur kærleikin fram, tá ið eg krúpi ístaðin fyri at ganga? Hvat um eg snávi, og hvat um eg falli

Hann helt fram: ”Fyri tveimum árum síðani, var eg nær deyðanum. Lívstráðurin kundi verið kvettur, tá eg var 21 ára gamal. Eg lá í briminum í Mikladali, tí eg var áhaldsin og datt. Vinmaður mín sá meg koma undan, men so var eg undir aftur. Tá bað eg til Guð, og segði at nú kundi eg ikki meira, men tú kanst. Tá fekk eg føturnar á klettin, men alt í einum kom brimið, og tók meg útaftur. Vinmaður mín sá meg ikki longur, men Guð misti meg ikki úr eygsjón. Tá klintraði eg upp í gjøgnum bergið, og eg var bjargaður. Heimafturkomin opnaði eg bíbliuna á einum tilvildarligum stað. Tað fyrsta eg lesi, eru orðini úr sálma 40. ”Eftir Harranum eg havi trúliga bíðað, og hann seg boygdi til mín og hoyrdi mítt róp. Hann dró meg upp úr undirgangsins djúpi, úr tí botnleysa díki; hann setti mínar føtur á klettin og gjørdi føst míni fet.”

Á sama hátt, bjargar Guð okkum tá Illimaður hevur snýtt okkum, og vit snáva og falla. Tá setir hann okkara føtur á klettin sum eitur Jesus. Og tá hevur Illimaður einki vald. Tað kann vera so skjótt at okkara lívstráður verður avkvettur. Tá er tað umráðandi, at okkara føtur standa á klettinum Jesus.”

Eftir andaktina kom I Am á pallin. Og nú ”flippaðu” áhoyrararnir rættiliga út. Lógvabrestirnir hoyrdust frá fyrsta til síðsta minutt. Og serliga tá sangurin ”Alla leið” varð spældur. Ei undur í, hann hevur jú ligið á ovastu rók í 15 teimum bestu. Og ikki bert tað. Orðini eru persónlig, og kristni boðskapurin kemur til sín rætt. Tað er eisini eitt pluss, at sangurin er føroyskur, so at øll kunnu skilja tekstin. Annars vóru ølll løgini á enskum. Í løtuni er I Am, helst tann fremsti gospelbólkurin í landinum. Teir komu víðari í innleiðandi Prix Føroyar umfarinum á Strondum.

Tá I Am-manningin hevði spælt eina løtu, kom VOX upp aftur á pallin. Hesaferð saman við I Am. Tað ljóðaði vakurt tá tey sungu ”Kærleiki er tað eg gevi tær..”. Ein slóðbrótan innan gospelrock- og rútmiskan kórtónleik

Allir bólkarnir komu væl frá tí, hóast tað átti at verið ein skrá, so ein lættari kundi hildið skil á, og eisini aftaná kundi minst til, hvat var á skránni. Samanumtikið var hetta eitt væleydnað tiltak, ið vit vónandi fara at síggja meira til í framtíðini.



*Frálík gospelløta í Runavík*



*Tey sungu og Harrin var mitt ímillum teirra*